## VIÐMERKINGAR

# Lóg um játtanarskipan

JÓGVAN SUNDSTEIN



Eftir at hava hoyrt framsøgumenn tingflokkanna í Útvarpinum sagt frá teirra hugsanum um omanfyrinevnda lógaruppskot, og serliga støðutakanina til Arbeiðsloysisskipanina, havi eg eina ferð afturat lisið lógaruppskotið ígjøgnum.

Sjálvt um uppskotið inniheldur nakrar ásetingar, sum í sjálvum sær eru skilagóðar, so dugi eg ikki at síggja nakað nýtt av týdningi í uppskotinum. Næstan alt, sum stendur har, er antin við í aðrari lóggávu frammanundan ella í fastlagdari praksis. Tí er meginparturin av lógaruppskotinum óneyðugt.

Einasta nýggja er tað, sum hevur vakt ávísa øsing, nevniliga definitiónin av skatti og spurningurin um ymiskir grunnar skulu við á fíggjarlógina. Sum eg skrivaði í grein her fyri, er tað mín uppfatan, at fyribrigdið skattur ikki er rætt definerað í uppskotinum. Tað eigur at vera loyvt at uppkrevja gjøld, sum bert eru ætlað til serligt endamál, uttan at definerað tey sum skatt og harvið flyta tey inn á fíggjarlógina. Tí eigur einki at vera til hindurs fyri, at ALS, Samhaldsfasti, Barsilskipanin v.m. kunnu vera sjálvstøðugar skipanir við egnari umsiting, leiðslu, nevnd v.m., um inntøkur og útreiðslur hjá viðkomandi skipan bert fylgja endamálinum hjá skipanini.

Tað at flyta inntøkurnar hjá hesum skipanum til fíggjarlógina (landskassan) og síðani útaftur beinanvegin gevur onga sum helst meining. Vandin fyri at "gloyma" at flyta inntøkurnar út aftur er helst ikki so stórur at byrja við, men tá ið mannagongdin er formaliserað á hendan hátt, kann freistingin til at broyta koma við tíðini. Vit minnast í øllum førum, hvussu var við fólkapensiónsgjøldunum í síni tíð (í 60unum). Tað gingu bert fá ár, so vórðu tey avtikin og løgd saman við vanliga skattinum, og fólkapensiónin gjørdist ein vanlig almenn útreiðsla.

Latið tí tær her nevndu skipanir, og kanska onkrar aðrar við, virka sum tær gera, og lat tær bara mennast uppaftur meira. So leingi sum so týðandi samfelagsbólkar sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum klára at stíla fyri, er eingin orsøk til politiska uppílegging. Og lat bara lógaruppskotið um landsins játtanarskipan fáa eina endurskoðan og bíða til næstu tingsetu.

# Ritt tók av innbjóðing frá Heðini

**Fríggjadagin vitjaðu Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn og Jens Marius Poulsen, kommunustjóri nýggja yvirborgarstjóran í Keypmannahavn, Ritt Bjerregaard. Heðin Mortensen beyð henna á vitjan í Havn, og hon tók av**

VITJAN



*Ritt Bjerregaard, yvirborgarstjóri í Keypmannahavn og Heðin Mortensen borgarstjóri í Havn*

Á heimferðini frá borgarstjórafundi í Oslo legði Heðin Mortensen, borgarstjóri í Tórshavn, leiðina inn á Ráðhúsið í Keypmannahavn til Ritt Bjerregaard, yvirborgarstjóra í Keypmannahavn, har hann saman við kommunustjóranum Jens Marius Poulsen hevði fund seinnapart fríggjadagin 24. mars.

Ritt Bjerregaard tók við starvinum sum yvirborgarstjóri tann 1. januar 2006. Hon var blíð og týð, og varð prátað um leyst og fast, bæði um politik og kommunumál av felags áhuga.

Ritt Bjerregaard greiddi frá, at hon hevði verið í Føroyum sum ministari, og tók hon væl ímóti innbjóðing frá borgarstjórarnum um at koma til Tórshavnar Kommunu á vitjan.

Samstundis var høvi til at vitja forvitnisliga framsýning hjá Nordatlanten, sum í hesum døgum er á Ráðhúsinum. 20 føroysk listafólk sýna fram har, líka frá málningalist, klædnasnið, leirlist til træskurð.


# Haldið Sosialin

Tekna teg sum haldara nú

450,- um ársfjórðingin

sparið 395,- í mun til leysasølu

950,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(650,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

miðlahúsið
í Vágsbotni




Sosialurin | TÓRSGØTA 1 · P.O.BOX 76 · FO-110 TÓRSHAVN · TEL 34 18 00
FAX 34 18 01 · POST@SOSIALURIN.FO · WWW SOSIALURIN.FO

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.

Ókeypis
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið

64

Navn: ______
Bústaður: ______
Postnr.: ______
Bygd/býur: ______
Telefon nr.: ______
Undirskrift: ______

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn